## DAGSINS MEINING

# Nýtt landsstýri

Í gjár fingu vit nýtt landsstýri. Stóra broytingin er, at tað nú verða níggju landssstýrisfólk. Fyri at fáa kabaluna at ganga upp millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Miðflokkin varð avgjørt at hækka talið á landsstýrisfólkum. Søgan endurtekur seg. Eftir síðsta val varð talið økt úr sjey upp í átta. Hetta er ikki nakað sunt og gott signal at geva: fyri at fáa politiskar kabalur at ganga upp, verður talið á landsstýrisfólkum hækkað.

Fyrrv. landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum hevur eftir øllum at døma mist hetta heitið. Ístaðin er stovnað eitt løgmálaráð, ið skal arbeiða við yvirtøku av løgreglu og dómsvaldi. Tað hevur ljóðað, at ætlanin var at fáa eitt superministerium, har løgfrøðiligi serkunnleikin varð drenaður úr hinum stýrunum og lagdur undir løgmálaráðið, ið tá skuldi virka sum eitt slag av innanríkisministerium við mest møguligum valdi. Hetta tykist tó blíva av ongum. Í endaorrustuni millum løgmann og varaløgmann mátti formaðurin í Tjóðveldisflokkinum enn einaferð geva seg og lata løgmann varðveita bæði uttanríkismál og alt, ið hevur við sjálvstýrismál at gera. Afturfyri hevur Hoydal fingið kommunumál. Umframt at hava skrivað undir at reka ein stig fyri stig politikk á sjálvstýrisleið, hevur Tjóðveldið slept kravinum at umsita sjálvstýrismál.

Men afturfyri at sleppa fullveldispolitikkinum bæði í teori og praksis hevur flokkurin kortini skorað 4 landsstýrisumboð. Væl er telvað og merkir valið av landsstýrisfólkum, at vongurin hjá formanninum er styrktur fyri ikki at siga vorðin fullkomin. Nú hvørki Signar, Finnbogi, Jógvan ella Finnur eru at síggja longur hevur Høgni buktina og báðar endar í flokki sínum og nærum í Tinganesi eisini. Hetta átti at givið stoff til eftirtanka hjá løgmanni og hansara feløgum. Her hugsa vit um ta beinhørðu linjuna, ið formaðurin hevur rikið bæði innanfloks og í landsstýrinum. Tíðin fer at vísa, hvussu væl landsstýrismenn Fólkafloksins fara at sampakka við ein varaløgmann, ið ikki hevur víst seg at standa fyri konsensuspolitikki, uttan so at hann hevur verið tvungin til tað av eitt nú løgmanni.

Nýtt landsstýri er skipað. Talan er um eina smæla samgongu. Valið vísti, at stórur partur av Føroya fólki vil ikki víðgongdu kósina hjá Tjóðveldisflokkinum. Ístaðin fyri at taka inn í samgonguna stóran andstøðuflokk/ar letur løgmaður sær lynda, at tann fyrr so víðgongdi Tjóðveldisflokkurin enn einaferð fullkomiliga skiftir kós og góðtekur alt hann annars hevur stríðst ímóti. Hvussu leingi kann henda støða halda fram, har vit hava ein stjórnarflokk, ið hevur sett fót fyri víðgongdu fullveldiskósini, og har vit hava ein Tjóðveldisflokk, ið brennir eftir at markera seg sum fullveldisflokk í øllum lutum. Tað verður áhugavert at síggja hesa javnvág í praksis. Vit minnast, hvussu somu fólk, sum tá og í dag eina og aleina kunnu takka sama Kallberg fyri, at Tjóðveldisflokkurin situr í Tinganesi, hunddálkaðu hann í farna skeiði. Vit ynskja nýggju landsstýrisfólkunum tillukku.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tvungin á stovn

**Elin Henriksen**

Fyri nógvum, nógvum árum síðani, langt áðrenn jarntjaldið fall, frættust dømi eystaneftir um lond, har børn vóru noydd at vera á stovni meginpartin av samdøgrinum. Hetta skuldi eitast at vera gjørt, tí at tey ráðandi ikki høvdu álit á uppalingarevnum foreldranna, og tí betur lá fyri at ávirka børnini, tá ið tey vóru á stovni. Við fólkaræðisliga hugsunarhátti okkara vóru vit skelkað - er tað ikki rættur foreldranna at velja, um børn teirra skulu á stovn ella verða ansað heima?

Tvangsinstitutionalisering - hetta helt eg hoyra heima í søgubókunum. Men hetta er "tilboðið", sum Tórshavnar Kommuna hevur at geva sínum smáu borgarum, sum skulu í skúla í 1. flokk í Kommunuskúlanum, sambært grein í Sosialinum sjálvan grundlógardagin, 5. juni 2002.

Dagurin hjá einum 6 ára gomlum barni fer at síggja soleiðis út: Frá húsum kl. 7.30 í frítíðarskúla og vera har, til skúlin byrjar kl. 12.45. Frí kl. 16, ganga til hús og vera heima kl. 16.30. Børnum í hesum aldri tørvar einar 10-11 tímar at sova í. Tvs. at 6 ára gamla barnið hevur "frí" 3 tímar um dagin - og í hesum 3 tímunum skal øll samvera við foreldur, systkin og vinfólk fara fram, og barnið skal eta døgurða og kanska gera skúlating.

At lata 6-7 ára gomul børn fyrst vera í frítíðarskúla og síðani í skúla frá kl. 12.45 til 16, "tað er ikki meiri enn næst best", verður formaðurin í mentunarnevnd Tórshavnar Býráð siteraður fyri. Nei, hetta hevur einki við næstbest at gera. Hetta er burtur úr vón og viti. Á kunnandi foreldrafundum fyri foreldrum at børnum í komandi 1. flokkum verður ofta tosað um, hvussu stóran týdning tað hevur, at børnini fáa eina góða skúlabyrjan; her verður grundarlagið lagt fyri einari góðari og sunnari menning gjøgnum skúlaárini osfr. Um nøkur meining skal vera í hesum, so má fyrst og fremst vera hugsað um tørvin hjá teimum yngstu skúlabørnunum, tá ið tað avmarkaða plássið skal býtast millum flokkarnar. Annars er hetta bara tóm orð.

At byrja í skúla er ein stór hending í lívinum hjá barninum; og ómetaliga nógv í restini av barna- og ungdómsárunum er treytað av, at skúlabyrjanin er góð. Tað ber ikki til at lova, at tað verður betur seinni. Barndómurin verður ikki endursendur. Heldur ikki tað avgerandi árið millum 6 og 7 ára aldur. Tað ræður um at gera tað rætta hvørt einasta ár, tí tann menningin, sum barnið fer ígjøgnum á hvørjum aldursstigi, hon kann ikki endurtakast ella útsetast. Tað er ikki sum hjá vaksnum, ið væl kunnu finna seg í ringum korum eina tíð við vitanini um, at tað verður betur næsta ár. Um tað ikki ber til at lata børn í 1. flokki sleppa at ganga í skúla fyrr um dagin enn til kl. 16, so er nógv betur, at tey bíða eitt ár við at fara í skúla.

Plásstrotið í kommunalu skúlunum í Havn kann ikki koma óvart á nakran. Talið á børnum verður skrásett 7 ár undan skúlabyrjan. Longu, tá ið eg fór í skúla í Tórshavnar Kommunuskúla fyri 40 árum síðani, høvdu 1. og 2. flokkur somu skúlastovu. 2. flokkur var í skúla frá kl. 8 til 10.50, og 1. flokkur frá 10.50 til 11.50, døgurðatími til kl. 12.50 og síðani aftur í skúla til kl. 14.40. Men tá vóru so at siga allar mammur heima.

Nú á døgum arbeiða flestu foreldur uttan fyri heimið. Og sambært uppfatanini hjá skúlamyndugleikunum arbeiða øll foreldur kortini til kl. 16-17; og so kann tað gera tað sama, um børnini byrja dagin við at fara í frítíðarskúla og síðani í skúla til kl. 16, ella øvut. "Skulu tey byrja fyrr á degnum, mugu tey í frítíðarskúla aftur eftir skúlatíð, og tað ber illa til, sigur Hanus Joensen", sambært Sosialin. Sig mær, NÆR HAVA VIT FINGIÐ SKÚLASKYLDU TIL FRÍTÍÐARSKÚLA ?

6-7 ára gomul børn í familjum, har annað foreldrið hevur tíðliga frí, skulu sostatt tvingast til at vera á stovni / í skúla í 8 tímar um dagin (umframt tíð til flutning), tí at nøkur foreldur arbeiða til kl. 16-17. Er nøkur kanning gjørd av, hvussu stórur partur av foreldrunum at yngstu skúlabørnunum arbeiða so leingi? Mínar royndir sum lærari og sum pedagogur - og sum foreldur, ið tosar við onnur foreldur - er, at rættiliga nógv foreldur hava møguleika fyri at leggja arbeiðstíð sína soleiðis til rættis, at tey kunnu koma tíðliga heim, meðan tey hava børn millum 4-5 og 9-10 ár.

Alt annað - skúlatíðin hjá eldri systkjum, barnagarðstíðin hjá yngri systkjum - og arbeiðslívið sum heild - er innrættað eftir, at dagurin byrjar kl. 8-9 um morgunin. Tað mátti borið til at latið børnini í 1. flokki havt fyrr frí, helst við at tey vóru í skúla fyrrapart; men eisini hóast tey skulu havt somu skúlastovu sum 2. flokkur, ið heldur ikki er so leingi í skúla. Tá ið tað ber til á Argjum og í Hoyvík, hví ber tað so ikki í Kommunuskúlanum? Fyri børn er stórur munur á at hava frí kl. 14-15 og so kl. 16.

Um tað ikki er pláss fyri 1. flokki í skúlanum, og frítíðarskúlin framvegis bert er eitt tilboð til børn í 1. flokki (og tað er ein heilt onnur søga), hví kunnu lærararnir so ikki bara fara niðan í frítíðarskúlan at halda skúla - fyrrapart, meðan børnini enn eru væl fyri? Aftan á skúlatíð kunnu so tey børnini, sum hava tørv á ansing, verða verandi í frítíðarskúlanum, meðan tey, sum hava nakran at fara heim til, kunnu fáa frí. Hetta er kanska ikki nøkur góð loysn, men tað er ið hvussu er betur enn tað tvungna uppihaldið á stovni / skúla allan dagin, sum Tórshavnar Kommuna bjóðar hesum børnum. Her hava foreldrini ikki møguleikan at velja at hava børnini heima seinnapart.

At forða 6-7 ára gomlum børnum í at hava nakra sum helst frítíð frá mánadegi til fríggjadag er at stjala barndómin frá teimum - og tað ber ikki til at geva teimum hann aftur.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Nýbyggingar, umbyggingar og umvælingar á skúlaøkinum í Havn



*Tey smæstu í Kommunuskúlanum fáa góðar skúlakarmar, tá ið nýbygningurin verður tikin í nýtslu um eitt gott ár*
*Mynd: Finnur Justinussen*

**Komandi árini verður stórt byggivirksemi á so at siga øllum skúlunum í Tórshavnar kommunu. Tað fyrsta, sum verður gjørt, er at byggja nýggjan skúlabygning til yngstu flokkarnar í Kommunuskúlanum**

SKÚLAØKIÐ
*Turið Kjølbro*

Nógvar ætlanir eru í umbúna á skúlaøkinum í Tórshavnar kommunu komandi árini. Umbyggingar, umvælingar og nýbyggingar. Fremst stendur nýbyggingin til Kommunuskúlan. Barakkin, sum hevur verið brúkt til yngstu næmingarnar í nógv ár, verður tikin niður í næstum, og nýggjur bygningur í tveimum hæddum bygdur.

Lendisarbeiðið er boðið út, og arbeiðið uppá restina verður boðið út í næstum. Í summarsteðginum verður spreingiarbeiðið gjørt og síðani verður farið undir at byggja. Longu um eitt ár skal skúlin verður klárur at taka í nýtslu. Sambært skúlastjóranum í Kommunuskúlanum, Hanusi Joensen, er hetta ein spennandi ætlan, har nútímans skúlatankar hava ein týðandi leiklut. Til hesin bygningurin er liðugur, mugu báðir fyrstu flokkarnir, sum byrja eftir summarsteðgin, í skúla seinnapart, og høli finnast til teir næmingar, sum í dag ganga í øðrum flokki.

- Arbeitt verður við at finna teimum hóskandi hølir. Vit kanna í løtuni, um vit kunnu nýta hølini í erva í Tilhaldinum til skúla. Hetta er eftir míni meting ein nýtilig loysn eina avmarkaða tíð. Alternativir møguleikar eru eisini, sigur Heðin Mortensen, formaður í mentunarnevnd Tórshavnar býráðs.

Útbygging av Kaldbaks skúla stendur eisini frammalaga í raðfestingini hjá Tórshavnar býráð. Á fundi í mentanarnevndini í Tórshavnar býráð í gjár var málið fyri.

- Tekningarnar eru lidnar, klárt er at fara undir arbeiðið og pengar eru til endamálið. Verður tað samtykt, verður farið undir arbeiðið beinanvegin, sigur Heðin Mortensen.

Argja skúli hevur verið ógvuliga trongur í nógv ár. Ein verkætlan fyriliggur um nýbygging niðanfyri verandi skúla. Ein ætlan til 60 mió. krónur, sum bindur gamla og nýggja skúlan saman. Enn er ikki avgerð tikin um, nær ella um farið verður undir hesa byggingina. Tað veldst eftir øllum at døma um tað eydnast Tórshavnar býráð at keypa Frímerkjadeildina á Argjum. Enn er endaligt svar ikki komið frá Landsstýrinum um hetta ber til.

- Sleppa vit at keypa Frímerkjadeildina, verður bygningurin brúktur til skúla. Tað er bæði ein skjót og góð loysn, sigur Heðin Mortensen.

Heimariskúli miðskeiðis í býnum er umbygdur fyri nógvar pengar. Hesin verður brúktur til 9. og 10. flokk á Venjingarskúlanum og tískil er ringasta trýstið á Venjingarskúlan tikið fyri eina tíð. Á sjálvum Venjingarskúlanum er stórt plásstrot. Tosað hevur verið um at bygt ein vong uppí afturat, men eingin ítøkilig ætlan fyriliggur um tað.

Sankta Frans skúli tørvar eisini ábøtur. Umvælingar verða gjørdar í løtuni.

- Ein loysn er at taka verandi fimleikahøll niður og byggja ein bygning uppaftur, sum hevur bæði skúlastovur og fimleikahøll. Hesin møguleikin verður kannaður í løtuni, sigur Heðin Mortensen.

Nógvu útstykkingarnar í Hoyvíkshaganum gera, at tað er neyðugt at fara undir skúlabygging í Hoyvík um ikki so langa tíð. Avgjørt er, at skúlin sum har skal byggjast, verður bygdur í mondulum, soleiðis, at útbyggjast kann, tá ið tørvur er á tí. Nýggjur skúli til Hoyvíkshagan stendur ovast á skránni, tá ið bygningurin til Kommunuskúlan og uppíbygningurin til Kaldbaksskúla eru lidnir, og spurningurin viðvíkjandi Argja skúla er loystur.

- Gongur alt sum ætlað, eiga vit at vera farin í gongd við ætlanina í Hoyvíkshaganum um eitt ár. Trýstið á Svimjihøllina í Gundadali er ógvuliga stórt og skúlarnir hava ilt við at sleppa framat. Tí er ein partur av verkætlanini eisini at gera eina nýggja svimjihøll í Hoyvík, til stórt gagn fyri allan Hoyvíkshagan. Eftir er bara at taka eina politiska avgerð, tá ið málið er komið so langt, sigur Heðin Mortensen.

## VIÐMERKINGAR

# Fólksins tænarar í Føroyum!

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*

Tað hevði verðið uppá tíðina, at kommunal-/landspolitikkarar fingu sett seg inn í viðurskiftir/lívskor/arbeiðandi verkafólksins á landi og á sjógvi, ið hava við fisk at gera.

Tað sama er galdandi alt embætismannaveldi/fulltrúar/serfrøðingar við ymiskum heiti skrivstovustjórar fólk/ almenna/landi/kommunur/privata/ríkið um alt landið.

Tað hevði verðið uppá tíðina at fáa tillaga avgreiðslur/umsitingar almenna landi/kommunala/privata/ríkið at tæna øllum vanligum viðskiftafólki um alt landi.

Tað er ikki minst galdandi innan alt handils/vinnulív/flutnings/handverkara/tænastuvinnur/ídnaðin/dagstovnar/skúlar/lærustovnar/felagsskapir/klubbar.

Tað er avgerðandi neyðugt, at vit læra øll børn, ungdómar lívsins harða skúla og at seta bein undir egið borð og skipa egið lív og gerandisdag um alt landi.

Tað skal komast tíð øktu stagnatión, egoismu, matrialismu, líkasælu, dovnu, forkelaðu, ledingar, samfelagssnúltarar, innan skúlar, lærustovnar, til lívs ídag.

Tað er ikki minst galdandi verkfalsbrótarar/skrúubrekarar, ið tóku upp verkfalsrakt arbeiði ein vil finnast harðliga at, ið avdúka at stuðla samansvornu.

Tað kann ikki vera rættvíst at ymiskar kreftir ein hevur viðgjørt í túsundtals lesarabrøvum stýra øllum tí politiska lívið/skipanum/flokkum /fjølmiðlum í dag.

Tað er ikki demokrati /fólkaræði/stýrið, ið valdar innan fyri tær ráðandi kreftir/skipanir/myndugleikar/vøldir tá vit hava diktatur/facismu/hernaðar/politistatir.

Tað er tá slíkt er skipað í einum størri stati við einaræðis valdsharrum, ið fremja brot á mannarættindini, so at tað stendur eftir, við skipaðum stættarmuni um alt landi.

Tað er gott at kunna alment avdúka øll oman fyri í lívbjarga sær við at halda øllum vanligum fólkið niðri.




STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR

Stationerir og transportablir størri samt smærri

Fáast í flestum støddum til øll endamál verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin